# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-USA roynir at gera tað sama í Venesuela, sum teir gjørdu í Bolivia, men vit hava fingið nóg mikið av tykkum yankees (Hugo Chavez)*

# Semja í Zimbabwe



*Eftir drúgvar samráðingar samdust stjórnarflokkurin og andstøðan í Zimbabwe í gjár um at býta tað politiska valdið í landinum. Sjálvt innihaldið í semjuni verður ikki almannakunngjørt fyrr enn mánadagin, men sambært álitandi keldum heldur Robert Mugabe fram sum forseti, meðan andstøðuleiðarin Morgan Tsvangirai (myndin) verður forsætisráðharri. Suðurafrikanski forsetin, Thabo Mbeki, hevur verið semingsmaður.*
*Mynd: Polfoto*

# Sigurin í Irak er ikki í eygsjón



*David Petraeus generalur*
*Mynd: Polfoto*

**Ovastin fyri teimum amerikonsku herdeildunum í Irak sigur, at tann blóðugi ófriðurin í landinum kann bresta áaftur**

David Petraeus, generalur, er samdur við George W. Bush, forseta í, at tað er vorðið nógv friðarligari í Irak teir seinasyu mánaðirnar, men hann er ikki so vísur í, at hetta verður varandi.

Petraeus, sum fer í annað starv í amerikonsku herleiðsluni nú eftir at hava verið ovasti í Irak í hálvtannað ár, sigur við bretska kringvarpið BBC, tað hava verið dagar og mánaðir, har Irak var stutt frá einari veruligari upploysn. Í dag er støðan ikki so ring, men generalurin ávarar um, at tað eru dimm skýggj á luftini, og at tey kunnu elva til stórar kreppur.

Amerikanskir fjølmiðlar hava í seinastuni borið tíðindi um, at USA fer at flyta sínar hermenn burtur frá Bagdad næsta summar. Tað vil David Petraeus hvørki vátta ella avsanna, men hann sigur tó, at ætlanin er at flyta hermenninar úr nøkrum býum. Hetta merkir ikki, at amerikanski herurin er um at vera liðugur við sína uppgávu í Irak, og enn er eingin sigur í eygsjón, sigur David

# Russisk bumbuflogfør venja í Suðuramerika



*Venesuelski forsetin Hugo Chavez*
*Mynd: Polfoto*

**Fyri fyrstu ferð síðani Kalda kríggið eru russisk bumbuflogfør við í venjing í Vesturheiminum**

Nøkur russisk bumbuflogfør av slagnum TU-160 komu í gjár til Venesuela, har tey skulu venja saman við flogførum hjá venesuelska flogvápninum.

Tað var venesuelski forsetin, Hugo Chavez, sum boðaði frá felags venjingini. Hann segði seg fegnast um, at Russland hevði sent flogfør til landið, og sjálvur ætlaði hann sær á flog við einum av teimum russisku flogførunum.

Viðurskiftini millum Venesuela og USA hava leingi verið spent, og eygleiðarar siga, at avgerðin hjá Hugo Chavez at bjóða russiskum bumbuflogførum hagar at venja fer ikki at linna spenningin við Washington. Men tað tyngir eftir øllum at døma ikki Chavez. Hann hevur tvørturímóti sagt, at hann umhugsar at fara ein túr við einum av teimum russisku flogførunum til Kuba at vitja gamla vinmannin Fidel Castro.

## STUTT SAGT

### Fá sóu Ongland vinna

Bara umleið 290.000 onglendingar sóu enska fótbóltslandsliðið hølva Kroatia av 4-1 í HM-undankappingini mikukvøldið. Orsøkin var, at tær stóru sjónvarpsstøðirnar ITV og BBC vildu ikki rinda tað, sum felagið, ið eigur sendirættindini, vildi hava. Ístaðin fingu fólk ein samandrátt av dystinum seinni um kvøldið.

Úr London frættist, at Gordon Brown, forsætisráðharri, var sera misnøgdur við, at so fáir onglendingar fingu høvi at síggja dystin. Sambært einum talsmanni skal forsætisráðharrin hava víst á, hvussu stóran áhuga onglendingar hava fyri fótbólti, og at tað tí er óheppið, at fólk ikki sleppa at síggja ein tílíkan dyst beinleiðis.

- Eg skilji tey, sum vilja hava at vita, hví tað var so, sigur Brown umvegis talsmannin.



*Gordon Brown, forsætisráðharri*
*Mynd: Polfoto*

### Russland dubbar seg

Russiski forsetin, Dmitrioj Medvedev, sigur við russiskar fjølmiðlar, at eitt tað fremsta málið hjá landsins leiðslu er at byggja tað russisku hermegina út, og at russiskir hermenn skulu hava alla ta nýggjastu og bestu útgerð, sum til er.

Medvedev ásannar, at tað tók ikki russiska herinum langa tíð at basa reka georgiska herin eftir hæli, men at átakið kortini avdúkaði skeivleikar, sum ætlanin er at rætta alt fyri eitt.

Russland byrjaði longu undir Vladimir Putin, forseta at endurnýggja herin, og eygleiðarar vænta, at Medvedev fer at halda fram við hesum arbeiðinum, samstundis sum endurnýggjanin eisini fer at umfata aðrar partar av hermegini so sum flotan og flogvápnið.